

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 08 - 2012

# Fimm nýggjar vindmyllur til SEV

Ímeðan mjørkin í gjár lá tjúkkur yvir partar av landinum, lá farmaskipið Emuna úr Týsklandi við Eystaru Bryggju í Havn og uppskipaði 5 nýggjar ENERCON vindmyllur, sum SEV hevur keypt. Hetta er einki minni enn eitt vegamót í orkusøguni hjá SEV, og tí var sum verða man, nevndarformaðurin í SEV, Jákup Suni Lauritsen, ein tann fyrsti á bryggjuni at síggja nýggju vindmyllurnar, sum skulu vera við til at kollvelta orkuframleiðsluna hjá føroyska orkufelagnum. Hann mátti við egnum eygum síggja hesar nýggju og eftir føroyskum viðurskiftum risastóru myllurnar, nú tær vóru komnar til landið og skjótt skulu til at gerast partur av elkervinum hjá SEV og harvið minka um oljunýtsluna. Einki at siga til, at hetta er ein stór løta fyri nýggja nevndarformannin í SEV. Hann ivast heldur ikki í, at myllurnar í mangar mátar kunnu gerast eitt gjøgnumbrot í orkuhøpi í Føroyum. Myllurnar byggja á eina heilt nýggja tøkni, og tað verður spennandi at royna tær á orkukervinum í Føroyum vísir hann á. Vindmyllurnar skulu í komandi viku koyrast við sergjørdum bili úr Havn til Neshaga á Toftum, har tær skulu setast upp við einum sergjørdum krana, sum kemur við Norrønu mánadagin. Av tí at talan er um umleið 25 metrar stórar lutir, sum skulu flytast, kann roknast við, at ferðslan í ávísan mun verður tarnað av flutninginum. Oljan.fo fer í næstum at gera meira burtur úr hesi stóru íløgu í varandi orku og hesa einki minni enn stórhending í føroyskari orkusøgu. Myndir - Ein ikki sørt errin Jákup Sune Lauritsen, nevndarformaður í SEV, skoðar verkið - tær fimm nýggju vindmyllurnar, sum eru komnar til Føroya og skulu setast upp í Neshaga í Eysturoynni. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller